TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 20.02.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 6/23 | 23/00043-2 | Tvøroyrar Bókasavn -roknskapur 2022 |
| 7/23 | 22/00373-2 | Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -Umsókn um stuðul til rakstur, viðlíkahald og løn til starvsfólk TBS |
| 8/23 | 22/00469-2 | TB-Fótboltur umsókn um stuðul til kappingarárið 2023 |
| 9/23 | 23/00060-1 | TB -fótbóltsvøllurin við Stórá skiftan av graslíki 2023 |
| 10/23 | 21/00594-1 | Nýggjur skúli |
| 11/23 | 22/00178-9 | Umsókn um broyting av byggisamtykt - bygging á matr. nr. 68 í Tjaldavík, sunnan fyri gamla landsvegin. Uppskot frá CS-Hús |
| 12/23 | 22/00491-2 | Varðin Pelagic -umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsiverksmiði |
| 13/23 | 23/00071-5 | Uppskot um broyting av byggisamtykti - viðkan av havnarlagnum - februar 2023 |
| 14/23 | 23/00046-2 | Hovs Kommuna -fyrisp. um samstarvsavtalu við barnatannlæknatænastuna hjá Tvøroyrar Kommunu |
| 15/23 | 23/00059-3 | LUKKA MÁL: |
| 16/23 | 22/00244-2 | LUKKA MÁL: |

| | | |
|---|---|---|
| 17/23 | 23/00068-2 | LUKKA MÁL: |
| **Til kunningar** | | |
| 3/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| 4/23 | 22/00110-2 | Seglloftið -útboð av rakstrið |
| | | |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin, lesur skránna og spyr um viðmerkingar eru.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon ynskir niðanfyri nevndu mál á skrá:

1. Val av stýrislimun í Bú- og Heimatænastuna BHS umboðandi Tvøroyrar Kommunu har limirnir verða valdir samb. lutfallvalháttinum.
2. Eina frágreiðing um teknisku deild.
    a. Hvussu er deildin skipað?
    b. Verður javnan eftirmett?
    c. Treytir hjá arbeiðsfólkunum?
    d. Støðulýsing av Viðalundini?
3. Støðulýsing av nýggjari heimasíðu hjá Tvøroyrar Kommunu og samstarvinum við Talgildu Føroyar.

Kristin Michelsen svarar uppá viðmerkingar hjá Súsannu Bertholdsen.

1. at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 3 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021, samt 3. februar 2022.
2. at tekniska deild er skipa samb. galdandi og samtyktu Kommunustýris- og Starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar Kommunu, ið er almen og til taks á heimasíðuni hjá Tvøroyrar Kommunu.
    a. Seinasta árið hevur deildin verði skipa við leiðslu av Kommunstjóranum og einum málsviðgerða, sum saman leiða deildina. Upplýsast kann, at umsitingin keypir sært uttanhýsis vegleiðing og ráðgeving eftir tørvi frá mál til mál.
    b. Kommunan hevur í tveimum umførum søkt eftir tekniskum leiðara seinastu 12. mnd., men ongin er enn settur.
    c. Tekniska toymið húsast í gomlu heilsølubygninginum á Hvitanesi, har tað starvast 12 fólk íroknað arbeiðsformanninum, ið hevur dagligu leiðsluna av arbeiðstoyminum.
    d. *Røktin av viðalundini fer fram samb. Løgtingslóg um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtinslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, og er ábyrgdarøkið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini hjá Tvøroyrar Kommunu. Upplýsast kann, at samb. uppskot til Løgtingsfíggjarlóg 2023, §18 «Umhvørvismál» eru 800tkr. avsettar á §18.33.2. «Landbúnaðarstudningur» 05. Træplanting (Stuðulsj.). Og Tvøroyrar Kommuna hevur avsett á FÆ2023, §633, 200tkr. til parkeringsøkið eystanfyri palntaguna og 30tkr.

til grilløki vestan fyri paintaguna. Upplýsast kann, at tekniska deild hevur kunna skóðfriðingarnevndina um skaðar, ið eru hendir á vøkstur, trø og gøtur á viðalundina í Trongisvági seinasta ári av illveðri.

3. Tvøroyrar kommuna hevur eina heimasíðu, sum er virkin, um enn henda er av eldri dato. Upplýsast kann, at umsitingin hevur í eina tíð arbeitt við veitara av nýggjari heimasíðu, sum er komin ávegis og vantandi kann verða liðug innan juni. 2023.
    a. Tvøroyrar Kommuna hevur undirskriva samstarvssáttmála við Talgildu Føroyar og verða tænastur, ið Vangin veitur tøkar, á nýggju heimasíðuni hjá TVK.

*SKÓGFRIÐINGARNEVNDIN
§ 2. 1) Ein skógfriðingarnevnd, sum hevur 5 limir, verður sett at hava eftirlit við friðaðum viðarlundum til verndar av vøkstri og dýrum á hesum lendum. Nevndin umsitur tann pening, sum latin verður henni til frama av træniðurseting í Føroyum.
§ 2. 2) Í nevndini sita 5 limir valdir av landsstýrinum. Nevndin skipar seg sjálv.

Limir í nevndini eru: (samb. heimasíðuni hjá Umvørvisstovuni)

- Sigga Rasmussen, Cand. hort., Tórshavn
- Jóhann Mortensen, tíðindamaður, Kaldbak
- Dánjal Petur Højgaard, lívfrøðingur, Søldarfjørður
- Jón Kragesteen, Tórshavn
- Maria Gunnleivsdóttir Hansen, Tórshavn
- Formaður í Skógfriðingarnevndini er Jóhann Mortensen, og skrivari er Rakul Arnfríð Dam.

**Til støðutakan**

**6/23**
**23/00043-2 Tvøroyrar Bókasavn -roknskapur 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 14/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 11/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 6/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.02.2023**
Umsitingin hevur hin 3.02.2023 móttikið roknskap fyri Tvøroyrar Bókasavn til góðkenningar.

**Lógargrundarlag:**

Løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005

> **§ 19.** Landið rindar skúlabókasøvnunum í studningi 60% av útreiðslunum til undirvísingartilfar og -amboð, meðan bý-/bygda(r)ráðið rindar restina. Umsókn um stuðul skal vera send Landsbókasavninum í seinasta lagi 15. mai árið fyri. Sambært góðkendari fíggjarætlan verður rakstrarstudningurin útgoldin við fíggjarársbyrjan, og avroknað verður við fíggjarárslok. Landsbókasavnið skal í seinasta lagi 31. januar árið eftir hava roknskapin fyri farna fíggjarár. Endaligi stuðulin verður avroknaður samsvarandi endaliga roknskapinum fyri undanfarna fíggjarár, studningurin kann tó í mesta lagi vera 60% av góðkendu fíggjarætlanini fyri tað árið.

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

__Mentanarnevndin 13. februar 2023:__
Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin hjá Tvøroyrar Bókasavn 2022 uttan viðmerking. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

__Fíggjarnevndin 20. februar 2023:__
Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin hjá Tvøroyrar Bókasavn 2022 uttan viðmerking. -Málið verður beint í býráði.

__Býráðið 20. februar 2023:__
Einmælt samtykt at tilmælið hjá fíggjarnevndini at góðkenna roknskapin hjá Tvøroyrar Bókasavn 2022 uttan viðmerking.

**7/23**
**22/00373-2 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -Umsókn um stuðul til rakstur, viðlíkahald og løn til starvsfólk TBS**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 86/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 6/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 7/23 |
| 4 Býráðið | 20.02.2023 | 7/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.10.2022**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá forkv. í Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn, ið søkir um stuðul til rakstur, viðlíkahald og løn til starvsfólk TBS.

Umsókn.

*Vit vilja søkja um kr 50.000,- til rakstur, kr. 200.000 til viðlíkahald/umvælingar og kr. 180.000,- til løn til starvsfólk.*
*Flagtekjan á Gestastovuni treingir til umvælingar, trappan inn til savnið er ring at ganga á og burdi verið gjørd av nýggjum, og tað manglar enn at gerast nakað við húsini hjá Bakkasiggu. Vit miða eisini í móti at fáa fatur á húsunum hjá Hannu Stubman.*
*Vinarliga, Siri Andreasen, Forkvinna*

**Stuðul frammanundan í 2022 til TBS:**
Tvøroyrar kommuna hevur hin 30. Juni 2022, einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini frá 14. Juni 2022, at stuðla Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn árið 2022, við kr. 325.000,-

- Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-
- Lønir til starvsfólk: 175.000,-
- Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúðin og Løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986

**Fíggjarligar avleiðingar:** Rakstrarkonti §528 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn útgreina: (Játta í alt FÆ2022 kr. 325.000,-)

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt at heita á nevndina um at møta til komandi fund í Mentanarnevndini, at greiða frá um ætlanir.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Einmælt samtykt, at veita stuðul kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn, greina har kr. 50.000,- eru til rakstur av bygningum og hølum, kr. 175.000,- til lønir til starvsfólk og kr. 100.000,- til umvælingar. Krav er um útgreining/skjalprógv fyri umvæling.

Einmælt samtykt, at støða um stuðul til møguligt keypa av húsinum hjá Hannu Stubman matr.nr. 498a, verður tikin eftir støðulýsing av húsinum av Mayfinn Norðoy. Málið verður tikið upp aftur til næsta fund í mentanarnevndini.

**Kommunustjórin 15.02.2023:**
Til viðgerðar -í fyrsta umfari- er bert samtyktin hjá mentanarnevndini hin 13. feb. at veita stuðul kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn, greina soleiðis, at kr. 50.000,- eru til rakstur av bygningum og hølum, kr. 175.000,- til lønir til starvsfólk og kr. 100.000,- til umvælingar. Og at krav er um útgreining/skjalprógv fyri umvæling.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Einmælt samtyk tilmælið hjá Mentanarnevndini –málið verður beint í býráði.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**8/23**

**22/00469-2 TB-Fótboltur umsókn um stuðul til kappingarárið 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.01.2023 | 1/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2023 | 4/23 |
| 3 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 11/23 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 8/23 |
| 5 Býráðið | 20.02.2023 | 8/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.12.2022**
Eyðdis Ellendersen, forkvinna í Tvøroyrar Bóltfelag TB, hevur vegna TB latið inn umsókn um peningarstuðul til fóltbóltsárið 2023.

Mælt verður í hesum sambandinum eisini at viðgerða nýtsluloyvið til vøllin og felagshúsið við Stórá kappingarárið 2023.

**Lógargrundarlag: Kommunusfulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023 §524, Stuðul til ítrótt er avsett kr. 2.3 mió.

**Tilmælið:** Visandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Einmælt samtykt, at stuðla við kr. 400.000,-, har 15% av stuðulsupphæddini, svarandi til kr. 60.000,- verður oyramerkt til ungdómsfótbolt, mælt verður til, at felagið innletur hálvársrokniskap. –Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Borgarstjórin mælir til at samtykkja tilmælið hjá mentanarnevndini har útgjaldið verður útgoldið í 4 ratum, har gjøldini fella til gjaldingar 1. jan, 1. apríl, 1. juli, 1. okt. Einmælt samtykt. –Málið verður beint í býráði.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Kristina Roest metti seg verða ógegnina og fór av fundinum. -Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini har útgjaldið verður útgoldið í 4 ratum, har gjøldini fella til gjaldingar 1. jan, 1. apríl, 1. juli, 1. okt. Einmælt samtykt, at útgjaldið til ungdómsdeildina 15% av stuðulsjáttanini á kr. 60.000,- verður útgolið í einum og flutt beinanvegin.

**9/23**
**23/00060-1 TB -fótbóltsvøllurin við Stórá skiftan av graslíki 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 12/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 9/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 9/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.02.2023**
Form. í Tvøroyrar Bóltfelag hevur sent Tvøroyrar Kommunu skriv við áheitan og ynskið um at grasliki á vøllunum við Stórá verður skift vegna slit og ábøtur verða gjørdar fyri at avvatna vøllin betri, ið er sera vátur á norðari hálvsíðu.

Form. í TB vísir á í skrivi, at ynskið hjá felagnum er at nýtt graslíli frá sama veitara verður álagt. Umsitingin hevur hin 26. Okt. 2022 –saman við form. í TB- havt ástaðis fund við veitaran, ið hevur veitt gamla graslíki.

**Tilmæli hjá umsitingini er at:**

1. *Skifta grasliki, til vøll har korkgranulat verður ífylla. (verandi vølli hevur gummigranulat sum ífylla) –tilboð er umbiði.
    a. *Mæt verður til at áleggja grasliki frá framleiðaranum DOMO sports grass av merkinum Domo Varioslide S Pro. Tað serstaka við hesum slagnum av grasliki er, at tað er framleitt til føroysk viðurskifti. Hæddin á grasstránum er 5,5 cm, sum er væl hægri enn vanligt, og tá trýst verður lagt á graslíkið frá einum bólti ella fóti og fer av aftur, so rættir strái seg upp aftur beinanvegin.*
    b. *Talan er um umhvørvisvinarliga loysn, har kork verður fylla, heldur enn gomlu loysnina, har flest allir vøllir í Føroyum hava gummigranulat sum fyllu. Gummigranulat er sera dálkandi, og er ein stór orsøk til nógv mikroplast í náttúruni, og er skaðiligt bæði fyri fólk, djór og livmargfeldið.*
2. Mett verður at verandi "shockpad" kann endurbrúkast. (sæst tá vøllurin er avtikin)
3. Neyðugt er at fremja betri avvatning av vøllinum. (Umsitingin samskiftir við ráðgeva)
    a. Stór óvissa er um kostnaðin at betra um avvatning.

*Kommunustjórin hevur í hesum sama sambandi heitt á veitaran, um eisini at lata inn serstakt tilboð uppá útskiftan av grasliki á lítla FIFA sparkivøllinum við Skúlan í Trongisvági. Graslíki við skúlan er sera dálkandi og sliti. Mælt verður til at útskifta til umhvørvisvinarligt graslíki við kork sum ífyllu.
***Samb. heimasíðuni hjá DBU:**
*7. sep. 2022. Kunstgræsbaner i hele Europa skal ikke længere være fyldt med gummigranulat. I hvert fald hvis det står til EU-kommissionen, der netop er kommet med et forslag om et totalforbud mod gummigranulat på alle europæiske kunstgræsbaner.*

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett eru kr. 4.0 mió á FÆ2023, §537 -Kostnaðurin av grasliki og áleggjan er kendur samb. tilboð, meðan kostnaðurin av avvatning er ókendur

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá DOMO sports grass av graslíkivølli av merkinum Domo Varioslide S Pro fyri ein kostnað á kr. 3.988.000,- vísandi til tilboð dagf. 13.02.2023. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og at heimila teknisku deild at samskipa arbeiði at skifta vøllin, samt at samskifta við veitara, at betra um avvatning av vøllinum -málið verður beint í býráði

**Býráðið 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**10/23**
**21/00594-1 Nýggjur skúli**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 85/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 67/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 05.04.2022 | 46/22 |
| 4 Býráðið | 05.05.2022 | 27/22 |
| 5 Mentanarnevndin | 10.05.2022 | 51/22 |
| 6 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 17/22 |
| 7 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 15/23 |
| 8 Býráðið | 20.02.2023 | 10/23 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10. oktober 2021)**
Forkv. í Mentanarnevndini Anita Vibergsdóttir ynskir málið at byggja nýggjan fólkaskúla verður sett á skrá og viðgjørt.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

- *Kapittul 6, Fyrisitingin §47. Stk. 5. Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygging og umbygging av verandi skúlum, smb. § 57, 4. stk.*
- *Kapittul 7, Meginfyrisiting og yvirumsjón §57. Stk. 4. Landsstýrismaðurin góðkennir øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Málið verður beint í býráðið sum eitt lukka mál.

**Mentanarnevndin 05. apríl 2022:**
Einmælt samtykt at byrjanin uppá nýggjan skúla verður at byrja, við støði verandi samtykt. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 05. mai 2022:**
Málið var umrøtt og kunna. Einmælt samtykt, at málið verður beint aftur í Mentanarnevndina.

**Mentanarnevndin 10. maj 2022:**
Einmælt samtykt at umsitingin vendir seg til Fuglafjarðar kommunu, og bjóða umboðum fyri skúlabyggingin í Fuglafjørði á vitjan hjá Tvøroyrar býráð, at greiða frá tilgongdini at byggja nýggjan skúla, nú Tvøroyrar kommuna ynskir at byggja nýggjan skúla á Tvøroyri.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Kommunustjórin, Fróði Mortensen kunnar um málið.
Málið verður tikið upp aftur á næsta fundið.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Forkv. mælir til at byrja verður ein tilgongd at byggja nýggjan skúla á Tvøroyri, har ein tørvsmeting verður gjørd, og støðu lýsing verður gjørd av verandi bygningum. Einmælt samtykt.
Málið verður beint í býráði

**Býráðið 20. februar 2023:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá mentanarnevndini, fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Súsanna Bertholdsen og Bjarni Hammer. Atkvøddi blankt Alvi Mortensen og Kristina Roest.
Tilmælið hjá mentanarnevndini er sostatt samtykt.

**11/23**

**22/00178-9 Umsókn um broyting av byggisamtykt - bygging á matr. nr. 68 í Tjaldavík, sunnan fyri gamla landsvegin. Uppskot frá CS-Hús**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2022 | 9/22 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.05.2022 | 27/22 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 11/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.03.2022**
Umsitingin hevur fingið ein fyrisp. frá CS-Hús, um møguleikið er fyri at fáa byggiloyvið á matr. Nr. 68 í Tjaldavík. Umsøkjarin hevur vitja Tekniskudeild, har hann hevur presentera ætlanina, og ynskir hann, áðrenn meira tíð og orka verður lagt í verkætlanina, at framleggja hesa fyri býráðnum, og hoyra um ætlanin evt. kann gjøgnumførast.

Tvøroyrar kommuna kann ikki loyva bygging á matr. nr. 68 samb. byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu, tá hetta liggur í friøki "H"

**§ 34: Øki H: Frílendi**

1) Frílendi eru lendi, sum ikki má byggjast á. Lutvíst eru tað lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka bygdina og gera hana dámligari at búgva í, og lutvíst eru tað øki, sum ikki tørvur er á at taka undir bygging í hesi syftu.
2) Á teimum í 1. stk. nevndu økjum mugu bert verða gjørdir gonguvegir. Broytingar í plantingini kunnu bert fara fram, tá ein nýtingar- og plantingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt natúrliga avmarkað størri øki.

3) Útstykking má ikki fara fram.
4) Økispartarnir kunnu nýtast til landbúnað, men eingin bygging má fara fram.
5) Gomul neyst og aðrar gamlar smábygningar við søguligum virði kunnu tó umvælast ella endurreisast soleiðis sum tey vóru fyrr, eftir loyvi frá avvarandi myndugleikum, herundir serloyvi frá býráðnum. Umvældur ella endurreistur bygningur, kann ikki nýtast til endamál sum ikki frammanundan er loyvt í friøkinum.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Galdandi byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022 -Ongin játtan avsett

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2022:**
Christian Sørensen var á fundinum og greiddi nærri frá um ætlanina. Kristin Michelsen mælir til at málið verður beint í Tekniskenevnd, sum kannar um møguligt er at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 68, Øravík, frá verandi frøkið til ístaðin vera øki "L" "Frítíðarhús og kamping økið". Einmælt samtykt

**Tekniska nevnd 09. maj 2022:**
Nevndin mælir til at broyta samtyktina fyri økið til: "L" "Frítíðarhús og kamping økið".

**Býráðið 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd.

**12/23**
**22/00491-2 Varðin Pelagic -umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsiverksmiði**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.01.2023 | 2/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 15.02.2023 | 5/23 |
| 3 Tekniska nevnd | 15.02.2023 | 16/23 |
| 4 Býráðið | 20.02.2023 | 12/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 29.12.2022**
Kristin Michelsen, borgarstjóri hevur d.d. móttikið umsókn um byggiloyvið frá Boga Jacobsen, forstjóra í P/F Varðin og stjóra í P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & Lýsiverksmiðju.

**Lógargrundarlag: Matrikkullógin og býarskipanarlógin**

**Tilmælið:**
Umsókn er komin frá Varðanum Pelagic, sum ikki er innan fyri karmarnar av verandi byggisamtykt galdandi fyri Tvøroyrar Kommunu. Mælt verður býráðnum til at taka støðu til umsóknina, hvørt umsitingin skal:

1. Gera uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri økið eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.
2. Loyva útfylling á sjógv eystan fyri verandi matr.nr 493a, har verandi virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur, har útfylta økið kann verða nýtt til staðseting av protein og lýsuverksmiðju hjá P/F Varðin Pelagic.

**Býráðið 26. januar 2023:**
Borgarstjórin mælir til at málið verður beint í Vinnu og havnanevndina. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 9. feb.2023:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

§6. (Kunngerð og framløga byggisamtykta)

*Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til almenn eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal fráammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skilja til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnar frá kunngerðardegnum.*

*Stk. 2. 1) Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar.*

*Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.*

*Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.*

*Stk. 5. 1) Víðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í § 4, stk. 4, avger landsstýrismaðurin, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.*

*Stk. 6. 7) Landsstýrismaðurin kann í heilt serligum førum, eftir áheitan frá kommunustýrinum, taka avgerð um at víkja frá ásettu freistum í stk. 1, soleiðis at framløgutíðin verður ásett til 1 viku og mótmælisfreistin til 1 viku frá kunngerðardegnum. Við áheitanini skal grundgevast fyri, hvørji týðandi samfelagslig og vinnulig atlit tala fyri, at umsóknin kann verða gingin á móti. Verður áheitanin gingin á móti, skal kommunan beinleiðis og persónligt kunna teir borgarar, ið beinleiðis verða ávirkaðir av broytingini, um hetta í seinasta lagi dagin eftir, at frávikið er givið.*

*Stk. 7. 7) Kærur sambært § 10 a um loyvir, ið eru givin við heimild í byggisamtykt, sum er fevnd av stk. 6, hava ikki steðgandi virknað.*

**<u>Tekniska Deild 13-02-2023:</u>**
Eftir áheitan frá býráðnum, 26. januar 2023, verður Vinnu- og havnanevndin biðin um at taka støðu til, hvørt umsitingin skal gera uppskot til byggisamtykt fyri økið (herundir sjóøkið) eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 15. februar 2023:</u>**
Samtykt at heita á umsitingina at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, við korti, at leggja fyri býráðið. Talan er um at víðka Havnarøki D uml. 100m eystureftir, og at samstundis at broyta Neystaøki G, ið liggur innanfyri, til Havnarøki.

**<u>Tekniska nevnd 15. februar 2023:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu-og havnanevndini. Umsitingin ger uppskot til broyting av byggisamtyktini, og tað verður lagt fyri býráðið.

**<u>Býráðið 20. februar 2023:</u>**
Súsanna Bertholdsen mælir til, at støða verður ikki tikin til málið at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, fyrr enn býráðið hevur havt fund við bólkin «Livilig Kor á Tvøroyri», sum hevur biðið um fund við býráðið.
Atkvøtt var um tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen.
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg Jespersen Bech
Atkvøtt blank: Bjarni Hammer og Kristina Roest
Tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen er harvið ikki samtykt.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdsen
Tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd er harvið samtykt.

**13/23**

**23/00071-5 Uppskot um broyting av byggisamtykti - viðkan av havnarlagnum - februar 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.02.2023 | 5/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 13/23 |

**Málslýsing:**
Varðin Pelagic ynskir í skrivi dagf. 29-12-2022 at víðka virksemið, og hevur til tað endamál tørv á, at byggisamtyktin verður tillagað.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Tilmælið:**
Eftir áheitan frá Vinnu- og havnarnevndini,15-02-2023, og Tekniska nevnd, 15-02-2023, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri Tvøroyrar kommunu soleiðis, at Havnarøki "D" verður víðkað 100 m eystureftir, har uml. 8422 m2 er uppfylt sjóøki, 1919 m2 verður broytt frá neystaøki "G", og uml. 233 m2 verður broytt frá miðstaðarøki "A". Sí viðhefta kort-tilfar, umframt yvirlit yvir matr. nr., ið verða umfatað av broytingini.

Eisini verður mælt til, at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini soleiðis, at §29 Øki D: Havnarøki, stk. 4, verður orðað soleiðis: "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skorsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins."

Broytingin er markað við gulum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. februar 2023:**
Nevndin varð kunnað um ætlanina.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá teknisku umsitingini.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Atkvøtt ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdeen
Tilmælið hjá teknisku umsitingini er harvið samtykt

**14/23**
**23/00046-2 Hovs Kommuna -fyrisp. um samstarvsavtalu við barnatannlæknatænastuna hjá Tvøroyrar Kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 13.02.2023 | 4/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 10/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 14/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.02.2023**
Hovs Kommuna hevur sent fyrisp. um samstarvsavtalu við barnatannlæknatænastuna hjá Tvøroyrar Kommunu

**Lógargrundarlag: -**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommuna verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 13. februar 2023:**
Einmælt samtykt við somu treytum, ið er galdandi við grannakomunur. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd. -málið verður beint í býráði.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu- og fíggjarnevndini

**15/23: LUKKA MÁL:**
**23/00059-** [redacted]

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 20.02.2023 | 15/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.02.2023**

[redacted]

**Lógargrundarlag:** [redacted]

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 20. februar 2023:**

[redacted]

**16/23: LUKKA MÁL:**
**22/00244-**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 61/22 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 15.02.2023 | 8/23 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 13/23 |
| 5 Býráðið | 20.02.2023 | 16/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.05.2022**

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 18. maj 2022:</u>**

**<u>Kommunustjórin 31.01.2023:</u>**

**<u>Vinnu- og havnanevndin 15. februar 2023:</u>**

**<u>Fíggjarnevndin 20. februar 2023:</u>**

Málið verður beint í býráði.

**<u>Býráðið 20. februar 2023:</u>**

**17/23: LUKKA MÁL:**
**23/00068-2**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 14/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 17/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14.02.2023**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**

**Býráðið 20. februar 2023:**

**Til kunningar**

**3/23**
**23/00044-1 Skattatøl 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

4/23

**22/00110-2 Seglloftið -útboð av rakstrið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 54/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 73/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 22/22 |
| 4 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 16/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 6/23 |
| 6 Býráðið | 20.02.2023 | 4/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.02.2022**
Eftir áheitan frá Borgarstjóranum, er leigusáttmálið gjørdur við Bindi Madsen hin 2 feb. 2022 um fyribils rakstur av Seglloftinum fram til 30. September 2022. Hetta vegna tað, at nógvir fyrisp. eru komnir til Tvøroyrar kommunu frá borgarum og fyritøkum um at leiga Seglloftið til merkisdagar.

**09.06.2022.** Forkv. í Mentanarnevndini, Anita Vibergsdóttir ynskir at viðgerða rakstrinum av Seglloftinum og Pubbini.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Forkvinnan í Mentanarnevndini mælir til at leiga Seglloftið og Pubbina út undir einum. Einmælt samtykt
Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Borgarstjórin mælir til at fíggjarnevndin samtykkir leiguavtaluna av Seglloftinum millum Tvøroyrar kommunu og FM Vindeygavask v./ Frank Madsen og Bindi Madsen. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 12.09.2022:**
Uppruna avtalan við FM Vindeygavask v./ Frank Madsen og Bindi Madsen um at tey fyribils reka Seglloftið til 31.09.2022, og er longd loypandi mnd/mnd. til at enda seinast 31.12.2022.

FM Vindeygavask v./ Frank Madsen og Bindi Madsen, hava í hesum tíðarskeiðinum staði fyri útleigan av Segloftinum til, har m.a. borgarum á Tvøroyri hava kunna hildið teirra merkisdagar, samt virkir og Tvøroyrar kommuna hava skipa fyri fleiri tiltøkum á Seglloftinum.

FM Vindeygavask v./ Frank Madsen og Bindi Madsen hava eisini framt fleiri dagføringar á Seglloftið, høvdusreingerð er framd, innbúgv er umvælt og dagført, útbúnaður í køkinum er umvældur og útskiftur, og umsókn um góðkenning til matvøruframleiðslu er til viðgerðar hjá HFS.

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 31.01.2023:**
Mælt verður til at gerða ískoytið í leigusáttmálan:

> *Avtalan um raksturin av Seglloftinum verður galdandi í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2023 og fram til 30. juni 2023, og eftir hetta, er sami sáttmálin galdandi so leingið, sum hesin ikki er uppsagdur við 1. mðr. fráboðan av Tvøroyrar Kommunu, ella til annur avtala er gjørd millum partanir.*

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Mælt verður til at leingja sáttmálan samb. tilmæli hjá umsitingini. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini –málið verður beint í býráði.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var kunna

Fundurin lokin kl. 18:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen